# Hanus á stóra palli

**Av tí, at so nógvar broytingar komu í leygardagsskránna, so endaðu fleiri nøvn á stóra pallium á Vágsbø, og Hanus var eitt teirra, og tað megnaði hann lættliga**

Summar FESTIVALUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Hanus G. Johansen hevur verið fastur maður á festivalskránni í Klaksvík øll árini.Undanfarin ár hevur hann havt leiklutin sum vísusangarin á Torginum í gula hálvmánatjaldinum.
Men í ár bleiv Hanus fluttur á stóra pallin. Og føroyski troubadoururin prógvaði, at ongin pallur er ov stórur fyri Hanus.
Tað var í veruleikanum at stórt pluss, ið lættliga kann endurtakast, hetta at flyta Hanus fram í røðina millum tey stóru nøvnini, tí tað er har hann hoyrir heima.
Hanus fylti allan pallin og allan Vágsbø. Ein kundi hildið, at skjótt gjørdist ovboðið. Ein maður við guitara, ið hann enntá viðhvørt leggur frá sær. Men so er ikki. Føroyingar troyttast ikki av Hanusi, heldur hinvegin. Og tað er í grundini ikki at undrast á, tí hann er ektaða vøran, og hon spillist sum kunnugt ikki so skjótt. Hanus hevur skrivað løg, ið halda í allar ævir, og Hanus er Hanus, tá hann er á palli. Hvørki meira ella minni.
Løtan á Vágsbø staðfesti, at Hanus er líka góður í dag, sum hann altíð hevur verið. Hann vaks í takt við brátt komnu uppgávuni at taka við á stóra palli. Og Hanus er jú eisini millum teirra, ið eigur flestu pallroyndirnar, bæði á føroyskum og útlendskum pallum, so tað undrar heldur ikki, at hann megnaði uppgávuna væl.
Hanus mundi stutt sagt ikki sloppið av pallinum aftur og hann sang eini 10 eykaløg (...eg misti í hvussu er talið). Og tað var kanska í botn og grund talan um eina mjúka løtu, har Hanus hjartaligur legði fram síni løg og sínar tulkingar, meðan fjøldin takkaði Hanus við at vísa honum sín kærleika og klappa og varðveita hann á pallinum, so longi tað yvirhøvur var gjørligt.
Og til alla lukku, so loyvdi mjørkakøvda festivalskráin Hanusi at standa longi á palli til gleði fyri allar partar.



# Blues í regninum

**Peter Thorup Trio høvdu eina sera góða framførslu í regninum í Klaksvík leygardagin. Sera spell at veðrið spældi teimum eitt puss, tí at tað viðførdi, at tað vóru sera fá fólk, sum lurtaðu eftir einari annars frálíkari framførslu**

Summar FESTIVALUR

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Peter Thorup Trio skuldu upprunaliga spæla á lítla pallinum á Torginum, men orsakað av seinkingunum av teimum útlendsku nøvnunum, framførdi bólkurin á høvuðspallinum í Vágsbøi. Poppkorn hevði beint frammanundan havt eina fína konsert.

Peter Thorup Trio spæla blues-kendan tónleik, og teir duga sítt kramm. Peter Thorup hevur eina hása rødd, sum hóskar væl til stílin hjá teimum. Bassspælarin var berandi í framførsluni. Hansara "walking-bass" og tað sveimandi ljómborð-spælið var sera gott.

Keðiliga veðrið spilti á ein hátt konsertina hjá Peter Thorup Trio. Tað eru helst nógvir Blues-fjepparar, sum settust aftur at fara til konsertina orsakað av veðrinum.



# Luftin fór úr Silvalandi

Summar FESTIVALUR

Stóra Silvalandið kom ikki heilt til sín rætt á Summarfestivalinum leygardagin. Regnið gjørdi, at tær mongu hoppiborgirnar ikki vóru blástar upp. Hetta sá tó ikki út til at oyðileggja dagin fyri børnini, sum stuttleikaðu sær í klætriborgini, reiggjunum, sandkassa og við ponyríðing.
- Sjálvandi eru vit kedd av, at hoppiborgirnar ikki kundu vera opnar leygardagin, segði Steintór Rasmussen, fyrireikari.
- Silvalandið riggaði ótrúliga væl hósdagin og fríggjadagin og var sera væl móttikið av bæði børnum og foreldrum.
Steintór Rasmussen er glaður fyri ta móttøku, Silvalandið hevur fingið. Hann sigur, at tað kann væl hugsast, at meir verður gjørt burturúr næsta ár, so børnini eisini hava okkurt at gleða seg til á Summarfestivalinum.